# Allir 20 komu í mál

**Fyri aðru ferð í ár og triðju ferð í allari formel1 søguni komu allir bilar, sum byrjaðu koyringina á mál, tá heimsins bestu rasarakoyrarar kappaðust á Monza breytini í Ferrari landi**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*


*Michelin hava stórar trupulleikar - Trupulleikar við vinstra bakdekki kostaðu Räikkönen sigurin, og sami trupulleiki var um at kosta Juan Pablo Montoya sigurin*

Á Indianapolis breytini fyrr í ár komu allir bilar, sum byrjaðu koyringina í má. Tá luttóku tó einans teir seks bilarnir, sum brúka Bridgestone dekk. Hetta var aðru ferð í allari formel 1 søguni. Á Monzabreytini sunnudagin byrjaðu 20 bilar, og allir sum ein komu á mál. Hetta hóast øll spáddu stórt mannfall á Monzabreytini, ið slítur motorarnar á formel 1 bilunum harðliga.

### Montoya vann

Kolumbiumaðurin í Mc Laren-Mercedes Juan Pablo Montoya byrjaði av fyrstu byrjunarstøðu, og megnaði at halda spanska Renault koyraran Fernando Alonso aftan fyri seg alla koyringina,. Montoya tók sostatt sín annan sigur hetta kappingarárið. Alonso kom um málstrikuna beint í hølunum á honum.

### Dekktrupulleikar aftur

Michelin dekkini fingu aftur á Monza ein óhepnan leiklut, við dekktrupulleikum á vinstra bakhjóli á báðum McLaren Mercedes bilunum. Dekktrupulleikar og eitt pittstopp at skifta vinstra bakdekk kostaðu Räikkönen í minsta lagið annað pláss, og møguliga eisini sigurin. Enn verri var, at hetta ivaleyst eisini avgjørdi slagið um heimsmeistaraheitið. Räikkönen endaði á fjórða plássi.

Montoya fekk somuleiðis trupulleikar við sínum vinstra bakdekki, hetta hendi við 4 umførum eftir, og kolumbiumaðurin stríddi seg á mál, men misti nógva tíð, so Alonso á øðrum plássi var beint í hølunum á honum um málstrikuna. Liðfelagin hjá Alonso, Giancarlo Fisichella tók triðja plássið á sigurskammlinum.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Michelin dekkini fáa ein óhepnan leiklut. Williams bilarnir, ið eisini brúka Michelin dekk, punkteraðu í seinastu koyring báðir á høgra bakdekki tvær ferð hvør og noyddust tí at gevast. Fyrr í ár valdu allir bilar við Michelin dekkum ikki at luttaka í amerikansku koyringini á Indianapolis, tí dekkini ikki vóru trygg. Hetta er sera óheppið fyri trúvirði hjá Michelin.

### Ein gandaður finni

Kimi Räikkönen koyrdi sum ein meistari alt vikuskiftið, men um hann var gandaður, hevði tað ikki gingið verri. Trupulleikarnir byrjaðu áðrenn tíðarkoyringina. Enn einaferð sveik Mercedes motorurin hjá unga finnanum. Hann noyddist at skifta motor, hetta flutti hann tíggju byrjunarstøður aftur. Hann koyrdi skjótastu tíðina í tíðarkoyringini leygardagin, og byrjaði sostatt á ellinta plássi.

Í byrjanini slapp Jaques Villeneuve framvið Räikkönen, sum sjálvur fór framvið Ralf Schumacher. Fyri Räikkönen var hetta sera óheppið, tí í 14 umfør lá hann á ellinta plássi, uttan at sleppa framvið Villeneuve.

Tá Villeneuve fór í pitt at fáa sær bensin, varð Räikkönen verandi úti, hann var byrjaður við fullum tanga, og bíðaði heilt inntil 24. umfar við at fara í pitt. Hetta flutti hann heilt upp á annað pláss, áðrenn hann fór í pitt.

Hann fylti tangan aftur, og hetta var nóg mikið at koma í mál við. Hann hevði sostatt ætlanir um bara at hava eitt pittstopp, meðan allir hinir skuldu inn aftur. Tí var ein sigur ikki heilt ósannlíkur. Men á 28. umfari, byrjaði vinstra bakhjól á McLaren-Mercedes'inum at skrædna. Räikkönen varð noyddur aftur í pitt, og kom út aftur á 11 plássi. Hetta kostaði ivaleyst sigurin og møguliga eisini heimsmeistaraheitið fyri koyrarar.

### Ringur Ferrari dagur

Ferrari høvdu ringasta dag á heimabreytini í nógv ár, tá hvørgin bilurin megnaði at koma í stigini. Michael Schumacher var í skugganum av liðfelaganum Rubens Barrichello allan dagin. Barrichello tók sætta pláss frá Schumacher í byrjanini, og lá framman fyri týskaranum, heilt inntil eitt av hansara Bridgestone dekkum punkteraði. Hetta kostaði tíð, og Barrichello endaði tí á tólvta plássi, tvey pláss aftan fyri Michael Schumacher.

Eisini Jenson Button, sum byrjaði av triðja plássi, mundi kenna seg heldur skuffaðan, av bert at fáa eitt stig á áttanda plássi.

Toyota gjørdist ein av teimum meira jaligu upplivingunum, Liðið fekk fimta og sætta pláss, og vísti at Toyota megnar at kappast við tey stóru liðini.

### Pizzonia avloysti Heidfeld

Triði koyrarin hjá Williams Antonio Pizzonia, avloysti Nick Heidfeld hetta vikuskiftið og fekk tvey stig á sjeynda plássi. Heidfeld valdi í samráð við formel 1 læknarnar ikki at luttaka í koyringini, tí hann var so ringur av høvupínu.

Pínan var sera svár í fríggjakvøldið aftan á, at hann hevði royndarkoyrt, leygarmorgun var pínan enn ring. Heidfeld rendi á við nógvari ferð seinastu viku, tá hann royndarkoyrdi, og pínan stavar sambært f1.com ivaleyst frá hesum óhappi.

Pizzonia er royndar- og eykakoyarari hjá liðnum, og hann hevur fyrr verið dystin fús sum avloysari. Hann koyrdi fýra koyringar fyri Ralf Schumacher í fjør, tá hesin fekk brot á ryggin á Indianapolis breytini.

### Heimsmeistaraheitið er mist

Heimsmeistarin í formel 1 2006 fer ikki at eita Michael Schumacher. Hetta kann staðfestast aftan á koyringina á Monza. Fernando Alonso hevur 48 stig fleiri enn Schumacher, og við einans fýra koyringum eftir er munurin ov stórur til, at Schumacher kann vinna. Eisini stríðið millum Alonso og Räikkönen er meira ella minnið avgjørt, við 27 stigum á muni, skal finnin vinna allar koyringarnar, meðan Alonso ikki má fáa meira enn 14 stig, tað er t.d. trý fimta pláss og eitt sjeynda pláss. So spaniumenn kunnu byrja at gleða seg. Tí longu um eina viku kann alt verða avgjørt, um Alonso fær fýra stig fleiri enn Räikkönen, er spaniumaðurin heimsmeistari.

## Úrslitið á Monza breytini í Italia

| Nr. | Koyrari | Bilslag | stig |
|---|---|---|---|
| 1 | Juan Pablo Montoya | McLaren-Mercedes | 10 |
| 2 | Fernando Alonso | Renault | 8 |
| 3 | Giancarlo Fisichella | Renault | 6 |
| 4 | Kimi Räikkönen | McLaren-Mercedes | 5 |
| 5 | Jarno Trulli | Toyota | 4 |
| 6 | Ralf Schumacher | Toyota | 3 |
| 7 | Antonio Pizzonia | Williams-BMW | 2 |
| 8 | Jenson Button | BAR- Honda | 1 |
| 9 | Michael Schumacher | Ferrari | |
| 10 | Felipe Massa | Sauber-Petronas | |
| 11 | Jacques Villeneuve | Sauber-Petronas | |
| 12 | Rubens Barrichello | Ferrari | |
| 13 | Christian Klien | Red Bull Racing | |
| 14 | David Coulthard | Red Bull Racing | |
| 15 | Mark Webber | Williams-BMW | |
| 16 | Takuma Sato | British American Racing Honda | |
| 17 | Tiago Monteiro | Jordan-Toyota | |
| 18 | Robert Doornbos | Minardi-Cosworth | |
| 19 | Narain Karthikeyan | Jordan-Toyota | |
| 20 | Christijan Albers | Minardi-Cosworth | |

## HM fyri koyararar

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 103 |
| 2 | Kimi Räikkönen | 76 |
| 3 | Michael Schumacher | 55 |
| 4 | Juan-Pablo Montoya | 50 |
| 5 | Jarno Trulli | 43 |
| 6 | Giancarlo Fisichella | 41 |
| 7 | Ralf Schumacher | 35 |
| 8 | Rubens Barrichello | 31 |
| 9 | Nick Heidfeld | 28 |
| 10 | Jenson Button | 24 |
| - | Mark Webber | 24 |

## HM fyri lið

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault F1 | 144 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 136 |
| 3 | Scuderia Ferrari | 86 |
| 4 | Toyota Racing | 78 |
| 5 | BMW WilliamsF1 | 54 |
| 6 | Red Bull Cosworth | 27 |
| 7 | BAR Honda | 25 |
| 8 | Sauber Petronas | 14 |
| 9 | Jordan Toyota | 11 |
| 10 | Minardi Cosworth | 7 |